

Vinfólk og samanhald er ein ótrúliga týdningarmikil partur, tá tú skalt yvirliva á gøtuni




Dreingirnir á heiminum hava ikki pening at keypa síni egnu klæðir, men líta á donatiónir frá gávumildum fólkið, og sum Sandile her, skapa sín egna stíl




Lívið sum gøtubarn kann ofta sýnast einsamalt og uttan framtíð

við til at townshippurin er ikki meira vandamikil enn inni í Cape Town. Tó fari eg at loyva mær at ivast í tí.

## Apartheit, søga ella nútíð

Vit vita øll, at apartheid er søga. Tó leggur ein merki til, at Cape Town er rættiliga uppdeilt. Millum annað í ítrótti. Rugby-landsliðið er mannað við einans hvítum. og fótbóltsliðið er mannað við svørtum. Svørt búgva í einum umráði í býnum, og hvít búgva í einum øðrum. Indarar búgva aftur í einum triðja umráði. So býurin er sum heild ikki serliga blandaður, sum eg annars av fyrstan tí hevði fatanina av. Orsøkin til at ein fær frænir av at býurin virkar blandaður, er nokk at miðbýurin i Cape Town hevur øll fólkasløg. Tó eru stórsti parturin, ið tú møtir her, turistar.

Nú tá eg havi fingið sagt, at eg meini at ein stórur partur av teimum hvítu í suðurafrika eru varin við teimum svørtu, vil eg eisini leggja afturat at tey allarhelst bara vilja verða fyrivarin, ikki bert fyri teimum svørtu og litaðu, men frá øllum ið kann verða vandamiki. Hetta er eitt ógvuliga kriminelt land og morð, innbrot og grotesk álop eru dagligdagur her niðri. Um eg ikki latið hoyra frá mær í longri tíð, hendir tað at onkur ringir fyri at kanna, um alt er í lagi. Fólkið her prioriterar tryggleika øgiliga høgt, og tey halda eyga við hvørjum øðrum. Tey minna meg á, umaftur og umaftur at eg skal aldrin slappa av. Eg má altíð hava eyguni opin og halda eyga við teimum, ið halda eyga við mær.

Og tíverri er tað soleiðis, at ein stórur partur av teimum, ið fremja kriminalitetinm eru tey við einum øðrum húðarliti enn hvítum. Tá tað jú eisini er hetta fólkaslagið. ið er lægst í sociala hierakinum. Apartheit árini eru kanska farin forbí, men tað er langur vegur enn, áðrenn hvít og svørt kunnu liva saman í Cape Town.



Børnini spæla við tað tey finna á gøtuni. Og eru sjálvandialtíð klár, tá ein "umlungu" tekur myndatólið fram



Pappkassar,træplátur og annað verður ofta nýtt sum tónleikainstrument

Sosialurin